# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kenslurnar sjónligar á Old Trafford



*Talan var um kensluborna løtu á Old Trafford, tá Gary Neville í gjár varð skiftur inn í dystinum móti Roma. Og sjálvandi fekk hann alt fyri eitt gula bindið um armin*

**Tað týdningarmesta var helst, at Manchester United spældi seg víðari. Men fyri áskoðararnar var talan eisini um stóra løtu, tá Gary Neville steig inn á vøllin fyri fyrstu ferð í 13 mánaðir**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Har vóru fleiri framúr evnaríkir ungir spælarar, sum komu upp á besta liðið hjá Machester United fyrra partin av 90'unum. Millum ungar mans sum Ryan Giggs, David Beckham, Paul Scholes og aðrar var eisini ein ungur Gary Neville.

Veruligan sáttmála sum yrkisspælari fekk hann ikki fyrr enn í januar 1993, men longu í september 1992 hevði hann spælt fyrsta dystin á besta liðnum. Hetta var í Europa Cup dysti móti Torpedo Moskva.

Uppgávurnar vóru kanska ikki heilt so nógvar fyrstu árini, men frá kappingarárinum 1994/95 setti hann seg á plássið, sum Paul Parker annars hevði havt á høgra bakki.

### Fer ikki til annað felag

Og sæð burtur frá teimum løtum, tá skaðar hava hildið honum burtur, hevur hann síðani hetta verið fastur partur av teimum fyrstu ellivu hjá Sir Alex Ferguson. Aloftast sum høgri bakkur, men eisini hevur hann til tíðir verið partur av miðverjuni.

Ofta verður hann kanska eitt sindur undirmettur av mótstøðufólkunum, sum ikki beinleiðis halda hann vera Guds gáva til fótbóltin. Men millum viðhaldsfólkini á Old Trafford er eingin ivi um, at Gary Neville telist millum yndisspælararnar. Hann er uppvaksin í Manchester, og har er United einasta felagið, sum hann hevur spælt fyri. Og nú dópsbrævið er farið um tey 33 árini sigur hann framvegis, at hann ongan tíð fer at spæla nakra aðrastaðni enn í felagnum, har hann nú er tann spælarin, ið hevur spælt fimt flestu dystirnar. Einans Bobby Charlton (759 dystir/249 mál), Ryan Giggs (750/143), Bill Foulkes (688/9) og Paul Scholes (563/138) hava spælt fleiri dystir fyri felagið.

Og tað var ikki annað enn náttúrligt, tá hann í kappingarárinum 2005/06 tók yvir sum liðskipari, eftir at Roy Keane gjørdi av at royna eydnuna í skotska Celtic. At hann so í sama kappingarári fekk bót fyri at háa Liverpool-áskoðararnar, eftir at Rio Ferdinand skoraði sigursmálið á Anfield, gjørdi ikki umdømið hansara millum fjepparnar á Old Trafford verri.

### Óheppin við skaða

Skaðar hava tó eisini havt sín part. Byrjanina av kappingarárinum 1999/00 sat hann uttan fyri við skaða í lærkrikanum. Á sumri 2001 breyt hann eitt bein í fótinum, og hetta helt honum uttan fyri næsta hálva árið.

Á sumri 2005 argaði lærkrikin aftur, og hesa ferð sat hann uttan fyri í tríggjar mánaðir. Móti endanum av kappingarárinum í fjør varð hann aftur skaddur, men hann var tó maðurin, sum slapp at lyfta Premier League steypið, men síðani hevur økulin hildið honum púrasta burtur frá liðnum.

Samanlagt gjørdist talan um 13 mánaðir uttan fyri liðið, og tí var talan um ikki sørt kensluborna løtu fyri bæði spælaran og áskoðararnar, tá Gary Neville í gjár varð skiftur inn í dystinum móti Roma.

Hvussu drúgvur steðgurin á besta liðnum verður hesaferð, er ilt at siga, tí skaðar hava hetta við at arga Gary Neville á yrkisleiðini. Men stendur tað bert til spælaran sjálvan, so setir hann seg aftur á fast pláss á liðnum hjá Manchester. Ein hugburður, sum higar til hevur borið hann langt. Bæði á vøllinum og á vegnum til hjørtuni hjá viðhaldsfólkunum hjá Manchester United.

### FAKTA um Gary Neville

Føddur: 18. februar 1975
541 dystir/7 mál fyri Manchester United
85 landsdystir fyri Ongland
Vunnið Premier League 9 ferðir
Vunnið FA-cup 4 ferðir
Vunnið Liga-Cup 1 ferð
Vunnið Champions League 1 ferð

## Roma tók ikki av

**Tá Roma misnýtti brotsspark fyri steðgin, var vegurin hjá Manchester United móti Barcelona at kalla asfalteraður**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við einum 2-0 útisigri í viðførinum var Manchester United stórfavorittur at vissa sær pláss í hálvfinaluni móti Barcelona. Og fyrstu longu løtuna av dystinum á Old Trafford í gjárkvøldið sótu vertirnir eisini á tí mesta.

Roma fekk tó spakuliga fótin fyri seg, og seinna partin av hálvleikinum høttu teir eisini fleiri ferðir málið hjá Edwin van der Saar. Størsta møguleikan av øllum fekk Daniel de Rossi, men í besta Elkjær-stíli bankaði hann brotsspark langt niðan til áskoðararnar.

Og eftir steðgin setti United seg aftur á tað nógva. Hóast menn sum Ronaldo og Rooney vórðu spardir á beinkinum, so løgdu eitt nú Tevez og Heargraves nógv fyri í royndunum at sannføra Sir Alex Feguson um, at teir skulu roknast millum teir fyrstu 11.

Heargraves hevði nógvar góðar renningar í dýpdina, og hann átti eisini at lagt United á odda fyri steðgin. Men tað gjørdist ístaðin eins hart arbeiðandi Carlos Tevez, sum varð sigursharri, tá hann sera hegnisliga stútaði innlegg frá júst Heargraves.

Og so var leyst og líðugt. Fagnaðurin øktist, tá Tevez fór út fyri Gary Neville, men tað týdningarmesta var, at hálvfinalan var heima. Ein hálvfinala, har Manchester United skal dystast móti Barcelona.

*Manchester United-Roma 1-0 (0-0)*
*(Man Utd. víðari við 3-0)*
*1-0: Carlos Tevez, 70.*